# Inter økir í Italia

Toppliðið Inter vann um vikuskiftið enn ein dyst í Seriu A, og liðið hjá Jose Mourinho dregur frá hinum liðunum í toppinum. Inter spældi ímóti Napoli, sum er nummar fýra, og Inter vann 2-1. Eisini okkurt av hinum liðunum í toppinum taptu, og tí er leiðslan hjá Inter framvegis greið í bestu italsku fótbóltsdeildini.



# Barcelona betrar metið

Spanska felagið Barcelona vinnur nógvar dystir í hesum tíðum, og leygarkvøldið vann Barca á útivølli ímóti Sevilla. Hetta var tíggjundi dysturin á rað á útivølli, sum Barcelona vinnur, og tað er nýtt met. Gamla metið varð sett fyri 80 árum síðani, tá Barcelona vann átta dystir á rað. Barcelona liggur á odda í sponsku landskappingini. Real Madrid tapti enn einaferð um vikuskiftið.

# Fundast um venjaran hósdagin

**Arbeiðið við at tekna vangamyndina av nýggja A-landsliðsvenjaranum í fótbólti er farið ígongd. Hósdagin hevur starvsnevndin hjá FSF fund, har komandi landsliðsvenjarin er á skránni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá Jógvan Martin Olsen í september mánaði boðaði frá, at hann legði frá sær sum landsliðsvenjari, segði FSF-forsetin seg vóna, at FSF var komið heilt væl áleiðis eini nýggjari venjarasetan, tá 2008 var farið at halla.

Í dag skriva vit desember í álmanakkanum, men enn er FSF ikki komið tann heilt langa vegin í setanini av nýggjum landsliðsvenjara.

- Tað er ikki komið hartil, at vit hava sett navn á nakrar kandidatar, sigur Høgni í Stórustovu, FSF-forseti.

- Enn eru vit í teirri fasuni, har vilja seta orð á, júst hvønn tørv og hvørji krøv og ynski vit hava um ein nýggjan landsliðsvenjara. Nakað hava vit tó fingið niður á pappírið, og nú hósdagin byrja vit so ætlandi við veruliga at tekna vangamyndina av nýggja venjaranum.

Tað hevur verið nevnt, at tit áttu at fingið ein útlendskan kapasitet til sessin. Er nøkur avgerð tikin, um talan verður um føroying ella útlending?

- Nei. Vit hava við vilja ikki útilokað nakað sum helst enn, tí vit vilja ikki læsa nakra hurð, sigur Høgni í Stórustovu.

- Fyrst og fremst er umráðandi hjá okkum, at vit hava samanhang í øllum landsliðskonseptinum – líka frá U14 til A-landsliðið. Og tí mugu vit eisini seta okkum spurningin, um hetta er nakað, sum ein nýggjur landsliðsvenjari skal verða partur av, ella um hesin einvíst skal hugsa um A-landsliðið.



*Høgni í Stórustovu, FSF-forseti*

- Vit mugu ikki enda í eini støðu, har vit bara seta ein venjara, og at vit so lata tað upp til hendan at skapa nøkur úrslit komandi tvey árini. Sum nevnd hjá Fótbóltssambandinum noðyast vit at hugsa longur enn til komandi undankapping ella til komandi U14-kapping í Aberdeen. Vit mugu skapa ein leist, har vit støðugt lyfta støðið, soleiðis at vit um tvey ár kunnu siga, at nú eru vit komnir longur, enn vit vóru í fyrri tveimum árum síðani.

- Og hetta er nakað, sum krevur eitt grundleggjandi kjak. Eisini hjá okkum. Og tað er sera umráðandi, at setanin av landsliðsvenjaranum eisini fylgir hesum. A-landsliðið vil so ella so vera okkara brand, men fyri menningina er altavgerandi, at hetta ikki bara stendur einsamalt, men at samanhangur er í allan vegin. Betur vit megna at lýsa teir karmar, sum ein landsliðsvenjari skal virka undir. Størri eru sannlíkindini fyri, at vit kunnu skapa eitt lokkandi arbeiðspláss hjá sama venjara, sigur Høgni í Stórustovu, FSF-forseti.

# A-landsliðið bara á Tórsvølli

**Svangaskarð verður neyvan karmur um A-landsdystir í framtíðini, men FSF hevur framvegis sáttmála við toftamenn**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Landsdysturin móti Ukraina í fjør vár verður eftir øllum at døma seinasti undankappingardysturin hjá A-landsliðnum, sum varð spældur undir opnum himmali á Svangaskarði*

Føroyska A-landsliðið hevur tríggjar undankappingardystir á heimavølli komandi kappingarár.

Felags fyri dystirnar móti Serbia, Fraklandi og Litava er, at teir allir verða spældir á Tórsvølli.

Og tað er nógv, sum bendir á, at dysturin hjá Føroyum móti Ukraina tann 24. mars verður seinasti A-landsdysturin, sum Føroyar hava spælt á Svangaskarði. Í øllum førum undir opnum himmali.

- Vit hava gjørt avtalu við Tórsvøll um, at vit spæla allar undankappingardystirnar hjá A-landsliðnum í Havn komandi árið. Hinvegin hava vit framvegis sáttmála við Svangaskarð, og tað koma vit eisini framvegis at hava, sigur Høgni í Stórustovu, FSF-forseti.

Hinvegin er eingin ivi um, at FSF hevur tørv á í minsta lagi tveimum vøllum. U-landsdystirnir eru nógvir í tali, og einsamallur megnar Tórsvøllur ikki at lyfta bæði venjingar og dystir hjá hjá yngru liðunum.

Samstundis hevur starvsnevndin hjá FSF játtað Svangaskarði sín stuðul í arbeiðinum at gera fótbóltshøll á Toftum, og so er spurningurin, um næsti A-landsdysturin á Svangaskarði verður undir taki.

Arthur Wharton 1865-1930:

# Fyrsti



*Tað tók tað mesta av eini øld, áðrenn tað varð góðtikið fult og heilt, at littir spælarar eisini gjørdu um seg í ensku liguni. Artur Wharton gjørdist fyri 119 árum síðani fyrsti litti yrkisspælarin í heiminum. 108 ár gingu, áðrenn grøv hansara fekk ta virðing, sum hon hevði uppiborið*